# Hósdagur 13. desember

## svf

18.25 DV í kvøld
18.30 Glóa 7:13
19.00 Trý við »Downs Syndrom« – norsk sending
19.25 Myndlist í Føroyum 2:9 (e)
20.00 Dagur og Vika við Magn
20.45 Ally McBeal 16 – amerikonsk rød
21.30 Airport – úr Heathrow floghavn
21.55 Krimitímin: Mrs. Bradley-gátturnar 3:4
22.50 Tannáringar og vakurleika-fyrimyndir – am. dokumentar
23.40 Liðugt

## EURO SPORT

7.30 Sailing - Ocean Race
8.00 Equestrianism - Fei World Cup Series
9.00 Car Racing - 2001 Michelin Race Of Champions
10.00 Car Racing - Automagazine
10.30 Luge - World Cup
11.30 Biathlon - World Cup - Live
13.15 Alpine Skiing - Men's World Cup
14.00 Curling - European Championships - Live
15.00 Swimming - European Short Course Championships - Live
16.45 News - Eurosportnews Flash
17.00 Biathlon - World Cup
18.30 Football - Kick In Action Groups
19.00 Football - Kick In Action Groups
19.30 Curling - European Championships - Live
21.00 Boxing - From The Eisstadion In Cologne
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Football - Kick In Action Groups
22.45 Football - Kick In Action Groups
23.15 Biathlon - World Cup
0.15 News - Eurosportnews Report
0.30 Close

## BBC PRIME

0.00 TLZ: »Shakespeare on the Estate«
1.00 TLZ: »Future Fantastic – Alien«
2.00 TLZ: »The Emperors Gift«
2.25 TLZ: »Computing and Classics«
2.30 TLZ: »The French Revolution – Impact and Source«
2.55 TLZ: »Computing and Literature«
3.00 TLZ: »A Global Culture«
3.25 TLZ: »Mind Bites«
3.30 TLZ: »Making Contact«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – Round and Round the Wagon«
4.40 TLZ: »Zig Zag – France – The Alps«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Like's and Dislikes«
5.30 Muzzy Comes Back
6.00 Bodger and Badger: »Fancy That«
6.15 Playdays: »The Playground Stop«
6.35 Steps to the Stars
7.00 Ready Steady Cook
7.30 Garden Invaders: »Stalybridge«
8.00 House Invaders: »Rusholme, Manchester«
8.30 Bargain Hunt: »Detling«
9.00 Battersea Dogs Home
9.30 Vets In the Wild
10.00 Holiday Snaps: »Paris – Milan«
10.15 The Weakest Link – Champions Special
11.00 Doctor Who: »The Mark of the Rani«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Serving the Community«
13.30 Holiday Snaps: »Lindos – Guernsey«
13.45 Ready Steady Cook
14.15 Bodger and Badger: »Fancy That«
14.30 Playdays: »The Playground Stop«
14.50 Steps to the Stars
15.15 TOTP Eurochart
15.45 Gary Rhodes' Christmas with a Difference
16.15 Ground Force: »Nottingham«
16.45 Miss Marple: »At Bertram's Hotel«
17.45 The Weakest Link – Champions Special
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Murder Most Horrid: »We All hate Granny«
20.00 Dalziel and Pascoe: »Child's Play«
21.00 A Bit of Fry and Laurie
21.30 Pink Parents
22.30 The Big Trip
23.00 Casualty

## BBC WORLD

0.00 BBC News followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News followed by Weather
1.30 World News Tonight
2.00 BBC News followed by Weather
2.30 Talking Movies (r)
3.00 BBC News followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News followed by Weather
8.30 HARDtalk (r)
9.00 BBC News followed by Weather
9.30 Talking Movies (r)
10.00 BBC News followed by Weather
10.30 Australia Direct (r)
11.00 BBC News followed by Weather
11.30 HARDtalk (r)
12.00 BBC News followed by Weather
12.30 World Business Report
12.45 Sport Today
13.00 BBC News followed by Weather
14.00 BBC News followed by Weather
14.30 Australia Direct (r)
15.00 BBC News followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.30 World Business Report followed by Weather
17.45 BBC News followed by Weather
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News followed by Weather
20.30 Australia Direct (r)
21.00 BBC News followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News followed by Weather
22.30 Click Online
23.00 BBC News followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

## 3

5.00 Børne-hjørnet med Disney
7.10 TV-shop
8.00 Herkules – de unge år
8.25 Ricki Lake (G)
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen (G)
11.00 Horton-sagaen
11.50 Panter-tanter
12.20 Vild med dig
12.50 Pæn pige – sej sild
13.15 Baywatch Hawaii (G)
14.10 Charlie's Angels
15.10 Min kære familie
15.40 Baywatch Hawaii
16.35 Ricki Lake
17.30 Med på moden
18.00 Sabrina - skolens heks
18.30 Alle tiders barnepige
19.00 Gitte og Camilla i sneen
19.30 My Girl
21.30 Tve-kampen VIP
22.35 Vore værste år
23.05 Simpsons
23.35 Nash Bridges
0.35 Ricki Lake (G)
1.30 Drøm videre
2.00 Vore værste år (G)
2.30 Dilbert
2.55 Sunset Beach
3.45 Godnat

## ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Terje Kjærbo í Klaksvík lesur
7.15 Jólaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin - Dia Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Terje Kjærbo í Klaksvík lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døguða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg stilar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stilar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Símun Jóannesarson Hansen stilar fyri
18.00 Jólaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera - Gestur í útvarpsstovuni er Jústinus Eidesgaard. Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Stuttsøga
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Rás

9.45 Orðið - Bibliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Politisk sending (e) - Endursending frá týsdegnum - Hesaferð við Tjóðveldisflokkinum
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14.00 Lýsingar
14.05 Yrkiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16.00 Tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Endatíðin: »Fyrigeving Guds« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bibliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

## Trý við »Downs Syndrom«

svf Hóskvøldið kl. 19.00

– Norsk sending

Espen, Beate og Hans Henrik somu áhugamál sum onnur ung. Tey hyggja at "Baywatch", spæla fótbólt og fara í dans. Kortini eru tey øðrvísi.

Norsk sending — Nordvision.

## Gitte og Camilla i sneen

Tær báðar, Gitte og Camilla, hava báðar luttikið í tí vælumtókta Robinson. Hesuferð hav teir skift baðidraktirnar út við skíðdraktir, og eru tær farnar til Alpurnar at uppliva, hvussu danir stuttleika sær á skíðbreytunum. Fyrsta ferðamálið er St. Anton í Eysturríki. Her skal nýbyrjarin, Camilla, á skíðskúla, meðan tann meira vandi skíðleyparin, Gitte, skal á skíðbrekkuvísing á 2330 metra hædd.

Sendingin hevur verið at sæð í januar mánaða í ár.

## My Girl

Tá pápi tín er heldur løgin, mamma tín er í himmalinum og omma tín er meira ella minni í ørviti, so er tað gott at hava ein vin, sum skilir teg, eisini um hann er ein drongur…

## ÚF Morgunlestrar
**10.–15. desember**

***Terje Kjærbo í Klaksvík lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**
**Mánadagin 10. desember:**
nr. 89 Byrja nú við trúgv og treysti
1. Mós. 3,15
nr. 131 Eg rósu upp sá næla

**Týsdagin 11. desember:**
nr. 92 Góð tann Mariumessa var
Matt. 1,30 og 38
nr. 93 Maria var moyggin rein og skær

**Mikudagin 12. desember:**
nr. 546 Sí. úr havi rísur nú morgunsól
Matt. 5,14

**Hósdagin 13. desember:**
nr. 56 Harmur og gleði í felag tey reika
Matt. 10,8b

**Fríggjadagin 14. desember:**
nr. 162 Ver heilsað, fagra morgunstund
Jóhs. 17,3

**Leygardagin 15. desember:**
nr. 221 Vakna, rópar vaktarmaður
Jóhs. 17,3



## VIÐMERKINGAR

# Nyrup og Jóannes hjálptu Sambandsflokkinum til valsigur

**Vagnur Michelsen**

Fólkatingsvalið er av, og nú er aftur vanligur politiskur gerandisdagur. Tá ið vit hava hildið jól og nýggjár, koma nakrir spennandi og avgerandi mánaðir í føroyskum politikki. Flokkarnir fara frá árs byrjan at brynja seg til løgtingsvalið í vár. Løgtingsvalið fer fyrst og fremst at snúgva seg um, hvat samband føroyingar í framtíðini skulu hava við Danmark; men valið verður dystur um, um føroyingar vilja hava Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin at stýra landinum næstu fýra árini, ella um núverandi samgonga skal halda fram.

Fólkatingsvalið segði okkum millum annað, at báðir stóru andstøðuflokkarnir hava meirilutan í fólkinum í løtuni. Men eitt er fólkatingsvalið, eitt annað er løgtingsvalið. Tað var mangt løgið, sum kom undan kavi, tá ið seinasta atkvøðan varð tald í fólkatingsvalinum. Sambandsflokkurin gjørdist stóri sigurharrin, sjálvt um veljarakannningarnar vístu eitt annað, og sjálvt um sambandsformaðurin viðgekk, at flokkurin ikki hevði gjørt meira enn vanligt áðrenn valið.

So kanst tú spyrja, hví Sambandsflokkurin fekk stóru undirtøkuna. Fyrst og fremst kunnu Lisbeth Petersen og flokkur hennara takka Poul Nyrup Rasmussen og Jóannesi Eidesgaard fyri valsigurin. Teir róku fyri Sambandsflokkin.

Poul Nyrup legði frá byrjan tann taktikk at seta føroyingar upp ímóti hvørjum øðrum, og hesin taktikkur eydnaðist, sum andstøðan í Føroyum nú heystar fruktirnar av. Júst fýra ára skiftistíðin gjørdi summar føroyingar bangnar um framtíðina, ja, sjálvt partur av Fólkaflokkinum byrjaði at hokna í kongunum.

Føroyingar hava einki at takka arroganta Poul Nyrup fyri, og tað er munur á monnum í donskum politikki. Poul Schlüter og Uffe Ellemann Jensen høvdu á sinni stóra virðing fyri føroyingum, og nú vil nýggi statsministarin Anders Fogh hava ein nýggjan »tóna« millum londini.

Vit eru nú tíbetur spard fyri viðmerkingarnar frá Poul Nyrup: Vi skal se fremad, se hinanden i øjnene og gensidig respekt, tóm orð sum forpestaðu sambandið millum Føroyar og Danmark.

Tað var undarligt, at Jóannes Eidesgaard skuldi fáa eitt so gott persónligt fólkatingsval. Eftir mínum tykki hevði hann ikki uppiborið at verið afturvaldur, sjálvt um eg havi stóra virðing fyri manninum. Jóannes hevur verið alt, alt ov negativur í orð og skrift. Tað var so galið fyri einum ári síðan, at Jóannes í Sosialinum beint fyri nýggjár mátti taka í egnan barm og gera tað nýggjárslyfti, at nú skuldi Jóannes í framtíðini vera meira positivur.

Javnaðartingfólkini hava ótroyttliga funnist at øllum, sum henda samgongan hevur borðreitt við, og serliga Høgni Hoydal hevur staðið fyri skotum. Javnaðarflokkurin misti fólkatingssessin, nú er so spennandi, hvussu flokkurin fer at standa seg í løgtingsvalinum. Javnaðarflokkurin kann enn einaferð gerast taparin, tí eg eri vísur í, at tílíkur negativur politikkur ikki hildnast í longdini.

Fyri 20 árum síðani, tá ið Dagblaðið hevði góðar dagar, var Dagblaðið mangan eitt stórt álop á Javnaðarflokkin. Óli skrivaði síðu upp og síðu niður um jarntjaldið og sosialismuna eystanfyri. Tá vóru harðir dystir í bløðunum millum Óla Breckmann og javnaðarpolitikararnar. Henda røddin er nú tagnað og striðsøksin burturbeind. Seinastu trý árini og eisini til seinasta fólkatingsval varð kanónin vend ímóti Tjóðveldisflokkinum. Serliga er tað sambandsvongurin í Fólkaflokkinum í høvuðsstaðnum, sum ger álop á Tjóðveldisflokkin.

Nýggi taktikkurin hjá Fólkaflokkinum kann kosta flokkinum dýrt, men tað kann so sanniliga eisini føra til, at núverandi samgongan tapir løgtingsvalið.

Eitt annað áhugavert í fólkatingsvalinum vóru úrslitinum í Vágum í Suðuroy. Hendan samgongan hevur tikið megnar tøk í valskeiðnum, millum annað verður borað undir Vestmannasund og til Gásatals. Sum tøkk fyri ótrúliga stóra stigið og stóru íløguna fekk Sambandsflokkurin størstu undirtøkuna.

Núverandi samgonga byggir suðuroyarskip fyri yvir 300 milliónir, og aðrar 100 milliónir skulu nýtast til ferjulegur. Sambands- og Javnaðarflokkurin fingu stóra undirtøku í Suðuroy.

Vit hava funnið olju, og allar oljufyrireikingarnar eru í góðum hondum.

Jú hendan samgongan hevur fingið nógv á skaftið, sjálvt um tað haltar á nøkrum økjum og nógv enn liggur á láni frá kreppuárunum; men eg haldi fast uppá, at størri dynamikkur altið vil vera í einari tjóðskaparligari samgongu enn í einari afturhaldandi samgongu í Føroyum.

Vónandi fær núverandi samgongan tøkkina fyri áræðið og stríðið á løgtingsvalinum komandi.

# 15 týðingar

**Jeffrei Henriksen hevur givið út 15 esperanto-føroyskar og føroyskar-esperanto týðingar**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Jeffrei Henriksen hevur á egnum forlag givið út 15 esperanto-føroyskar, og føroyskar-esperanto týðingar av yrkingum. Jeffrei Henriksen valdi og týddi.

Yrkingarnar í savninum eru eftir eitt nú Christian Matras, Tibor Sekelj úr Jugoslavia, Wislawa Szymborska úr Pólandi, S. J. Agnon úr Ísrael, og onnur. Føroysk kvæði og skjaldur eru eisini við.

Í formælinum skrivar týðarin, at millumtjóðamálið, esperanto, veitir øllum tjóðmálum, smáum sum stórum, somu sømdir, so at alskyns bókmentir kunnu á jøvnum føti í esperanto-umsetingum, verða lisnar um allan heimin.

Savnið kostar 50 krónur.

Leikuppseting í Havnar Sjónleikarfelag:

# »Ísbjarnirnar« eftir Jonas Gardell

SJÓNLEIKUR
*Gulla Øregaard*

At Havnar sjónleikarfelag tekur nýggjan dramatikk á skránna er at fegnast um.

Felagið hevur gjørt nógvar ymiskar royndir seinastu árini, men hevur ikki rættuliga vágað sær í gongd við modernaðan nýggjan dramatikk. Skulu vit kenna leikritaskriving í grannalondum okkara, so mugu føroysku leikhúsini framyvir spenna seg út. - Sjónleikarhúsið hevur við hesi uppseting gjørt eina góða royndi.

Vit eiga í dag so nógvar góðar leikarar, at tað er onki ov nógv, at vit í Havn ,kunnu fara tvey ymisk stað til góðan nútíðar sjónleik, umframt at Norðurlanda Húsið av og á kann geva okkum stórar leikløtur.

Leikurin "Ísbjarnirnar" eftir Jonas Gardell er ein náðileys úrlating av eini eldri konu og mammu, sum ikki røkkur børn síni. Sum úrslit av hesum kryplast børnini sálarliga, og hetta snýr leikurin seg um.

Tær tríggjar Nora Bærentsen sum móðurin Elsa , og døturnar Gerda og Solveig (Gunnvá Zachariassen og Eyð Matras) geva okkum áskoðarum beiskleikar frá gerandislívi teirra beint í gronini, uttan at vit fáa vart okkum.

Í stuttum er leikurin um eina 72 ára gamla mammu, sum av partvís ókendum orsøkum ikki hevur megnað at sloppið sær á flog, men hevur gjørt tað, sum samfelagið (møguliga maðurin) hevur álagt henni, og tað er at fostra síni trý børn, uttan sjálv at kunna realisera sínar ambitióunir um eina sjálvstøðuga karrieru.

Hon hevur kastað sín kærleika á sonin Gabriel. Men her er heldur ongin góðska at heinta. Sonurin gerst rithøvundi og brúkar mammuna og heimið sum tilfar til skaldsøgu og prosess at sleppa sær burtur úr okinum við umklamrandi mammuni.

Mamman harafturímóti sær bara sonin, tí at hann er vorðin kendur. Mamman hevur føðingardag og fyllir 72 ár, tá leikur byrjar. Døturnar koma, men her spyrst bara kuldi og róp og skrál burturúr. Mamman kennir seg einsamalla og hevur onki yvirskot at skilja døturnar, men gevur teimum eina kenslu av, at tær onki eru. Tær bøna og biðja um forstáilsi, kortini er bara kuldi og einsemi til staðar.

Tann eldra dótturin Solveig (Eyð Matras) er sjúkliga neurotisk og forstýrað. Hin yngra Gerda (Gunnvá Zachariassen) er eitt avrit av mammuni, men hevur ikki styrkina. Leikurin vísir kulda og einsemi millum menniskju, tá ið verunligur kærleiki ikki er til staðar.

Leikurin er beiskur, tó eisini humoristiskur. Jonas Gardell fær verunliga givið okkum nakað at hugsa um.

Egi Dam hevur leikstýrt neyvt, so karakterirnir eru skærir. Serliga klár er mamman. Hjartanemandi í síni sorg hvørki at røkka sínum málum, tíans heldur at røkka teimum børnum, hon hevur sett í verðina.

Nora Bærendsen prógvar í hesum leiki, at hon er góður karakterleikari - Heilt gjøgnumførd í torføra spælinum.

Gunnvá Zachariassen og Eyð Matras spæla somuleiðis væl. Hevði ynskt at spælistílurin var meira avpassaður til mammuna, ella at mamman hóskaði betri til teirra spælistíl.

Jytte Joensen hevur umsett leikin til lætt og nattúrligt pallmál.

Sjálvur pallurin var ein discount útgáva, sum kundi verið meira spennandi. Ljósið var harafturímóti gott.

Video innslagið við sninum og tíðindakonuni var frálíkt. Hóast bílætið var blakað upp á ein gaze klæddan vegg.

Leikskráin var sera fátæklig, tá hugsað verður um hesa nýroynd við norðurlendskum leiki. Leikhúsið hevur skyldu at geva okkum áskoðarum eitt sindur av vitan um mið og mál uttanum nýggjar uppsetingar. Eisini haldi eg at plakatin er keðilig, tó at fotomyndin er góð.

Sjónleikarhúsið eigur at verða fylt við áskoðarum, sovít vit leggja nakað í modernaðan dramatikk. Her er so eitt dømi um gott leikrit og frálíkt spæl.